# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vælferð undir trýsti

Tá tað sansar at fíggjarliga kemur vælferðarsamfelagið undir trýst, og fíggjarkreppan, sum nú leikar á, er einki undantak. Stórt hall verður á løgtingsfíggjarlógini og eingin vil ella torir munandi at økja um almennu inntøkurnar t.v.s. at hækka skattir og avgjøld. Í einum vanligum fólkaræði høvdu ábyrgdarpolitikkarar roynt at leita eftir nýggjum inntøkum og latið breiðastu herðarnar borið tyngstu byrðarnar. Men her í Føroyum er 50% skattahámarkið og skattalættar ein mantra, eitt tabu, sum eingin flokkur vil nema við klova. Farið verður tí til verka at finna sparingar og oftast verður skorið á almanna- og heilsuøkinum. Mangan verða hesar skerjingar framdar sum mekanisk avskriving eftir donskum leisti. Broytingarnar á heilivágsøkinum eru eitt gott dømi um hendan arbeiðshátt og tey sum fremja broytingarnar, tað veri seg politiskt og/ella fyrisitingarliga, hugsa ikki um, at viðurskiftini í Føroyum og Danmark eru ymisk. Hetta er mál, sum Sosialurin hevur sett ljóskastaran á undir heitinum "Vælferðarføroyar í fillum".

Sostatt fáa vit hesi ógvusligu sveiggini í vælferðarskipanini – tvey fet fram og eitt fet aftur. Hesi sveiggini elva til misnøgd og ótrygd hjá teimum mongu, sum hava ymsar vælferðartænastur og veitingar at líta á í einum truplum gerandisdegi. Stór misnøgd hevur leingi verið við broytingarnar í heilivágstilskotinum, við ólavsøkupakkan og sum heild við gongdina á vælferðarøkinum. Í gjár loysti so formaðurin í Javna frá posabandinum. Í hvassari men sakligari og greiðari tíðargrein her í blaðnum prógvar formaðurin, at førdi almannapolitikkurin gongur ímóti øllum teim málum, løgtingið setti sær, tá tað 13. mai einmælt samtykti at seta ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, í gildi í Føroyum.

Óli Wolles vísir á, at týðandi sosialar skipanir, sum við tógvið stríð eru bygdar upp, sum úrslit av sparipolitikkinum nú verða verða brotnar niður. Víst verður á, at samstundis sum ST-sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, fær gildi í Føroyum, arbeiða føroyskir myndugleikar við broytingum og átøkum, ið ganga beint ímóti sama sáttmála – hetta hendir sostatt samstundis, sum vit júst hava bundið okkum til at halda ST sáttmálan.

Her er nakað galið, hetta hongur ikki saman. Hví verður mekaniskt farið eftir teimum veikastu, hvørja ferð tað fíggjarliga lotar úr hanakjafti í hesum landi? Hví tvíhalda vit um fantasileysa og mekaniska avskriving av almannapolitikkinum hjá eini danskari stjórn, hvørs mál tykist vera ein skipað niðurlaging av vælferðarsamfelagnum? Hvat er hetta fyri nakað? Hvørjar politiskar, fíggjarligar og sosialar útgreiningar liggja til grund fyri hesum avgerðum, sum hvørja ferð koma eins og snarljós av heiðum himni og hótta við at venda upp og niður á gerandisdegnum hjá túsundtals medborgarum? ST sáttmálin er eitt frambrot. Vit byrja eitt nýtt skeið, eitt tíðarhvarv í okkara almannasøgu við at bróta júst sama altjóða sáttmála, sum markerar hetta tíðarhvarv. Her hongur ikki saman. Her lekur sum ikki einaferð millum teori og praksis. Er hetta tað land okkum hóvar?

**Sosialurin**

## Hárreisandi og hjartaskerandi skriv frá Javni

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Nú sendi Javni út skriv, har vit vórðu kunnaði um viðurskifti hjá fólki við menningartarni og familjum teirra. Javni ger vart við heili 13 broytingar á almannaøkinum. Nakrar teirra eru hesar:

- Mótrokning í pensjónini, um fyritíðarpensjónisturin hevur inntøku
- Loftið, sum sett er í mun til inntøkumiss nærmast frá degi til dags
- Børn við serligum tørvi, sum verða tikin heim úr Danmark, uttan at nøktandi tilboð er her
- Skúladagurin verður styttur hjá børnum við serligum tørvi
- Stuðul til heilivág er skerdur

Undan skrivinum frá Javni hevði Sosialurin skrivað opnuna "Vísið náði" sum eisini varpaði ljós á nøkur av hesum viðurskiftunum. Í Dimmuni týsdagin var grein, sum lýsti ferðina hjá einum unglingi úr Vágum, sum altíð hevði kent seg øðrvísi, tí hann hevði ADHD. Nú treivst hann væl í einum heildartilboði í Danmark og hevði funnið lívsneistan.

Sum politikari, sum sosialráðgevi, sum menniskja, sum føroyingur kennist tað bæði hjartaskerandi og hárreisandi at lesa hesar greinar og skriv.

**Taka burtur hálvan blindtarm?**

Vit hava hoyrt fleiri dømi um børn og ung við serligum tørvi, sum eru send av landinum, men nú koma hesi heim í úrtíð. Vit hava hoyrt í miðlunum, at tað gongst fleiri av hesum unglingunum væl, og at tey mennast fakliga og persónliga í Danmark. Mær vitandi er einki tilboð til teirra her. Tá vit kenna tørvin hjá hesum unga menniskjanum, eigur hann at vera nøktaður. Selma Johannesen nevnir hetta alment umsorganrsvik. Eg eri samd.

Um talan var um ein persón við blindtarmsbruna høvdu vit ongantíð bjóðað viðkomandi eina hálva blindtarmsskurðviðgerð! Um ein persónur hevur trý beinbrot, hjálpa vit honum ikki við tveimum av teimum og lata standa til við triðja beinbrotinum! Um ein ætlan er løgd, fyri ein persón sum fer av landinum til eitt heildartilboð, má ætlanin væl fylgjast til málið er rokkið.

**Heildartilboð til Føroyar**

Vit kunnu øll semjast um, at tað er ov ússaligt og pínligt, at vit einki heildartilboð hava til hesi fólk í Føroyum. Sambýlir, íbúðir, virkistilboð og røttu størvini er tað okkum tørvar. Nú eru so nógv ár síðani, at hetta økið var heimtikið – men framvegis hava vit einki heildartilboð í landinum. Tað hevði verið besta loysnin. Tá kundu hesi børn verið hjá sínum kæru í einum kendum og tryggum umhvørvi. Tosa eitt mál sum ikki var fremmant. Men økið hevur ikki verið raðfest politiskt! Tá tað besta ikki er ein møguleiki í 2009, mugu vit taka av tí næstbesta. Samstundis eiga vit í nógv størri mun at taka tøk fyri at eitt heildartilboð gerst veruleiki í Føroyum.

**Spurningur til politikarar frá Javni**

Í skrivinum spyr Javni tinglimir, um vit – við støði í teimum dømunum tey nevna í skrivinum - halda førda alamannapolitikkin verða nøktandi og virðiligan. Eisini verður spurt, um hann er í samsvar við tað, vit hugsaðu okkum, tá vit samtyktu ST sáttmálan í vár um rætt teirra sum bera brek. Og seinast verður spurt, um vit halda, at tað á fíggjarlógini er givið Almannamálaráðnum fíggjarligar umstøður til at kunna liva upp til sínar skyldur.

**Svarið er: Nei, nei og nei!**

Førdi almannapolitikkurin er púra óvirðiligur. Tað hevur verið so sólarklárt líka síðani ABC sá dagsins ljós. Tá ST sáttmálin var til viðgerðar í tinginum bleiv fleiri ferðir sagt, at nú mátti tað ikki henda, at vit bert samtyktu sáttmálan og annars einki gjørdu. Talan mátti ikki bert gerast um føgur orð. Vælvitandi, at ætlanin er at gera ymsikt munagott í samband við sáttmálan, mugu vit eisini staðfesta, at samgongan longu hevur tikið fleiri avgerðir, sum eru beinleiðis í stríð við sjálvan ST sáttmálan. Millum annað skal sáttmálin tryggja øllum møguleikan fyri at arbeiða. Kortini samtykti samgongan, at mótroknast skal frá fyrstu krónu í fyritíðarpensjónini, um fyritíðapensjónisturin arbeiðir. At børn við serligum tørvi hava færri skúlatímar enn onnur er eisini beinleiðis í stríð við ST sáttmálan - sæð úr mínum sjónarhorni – tí, hvussu skulu hesi megna eitt útbúgving ella starv, tá tey longu verða skúgva til viks í fólkaskúlanum?

Um vit hava givið Almannamálaráðnum fíggjarligar umstøður at liva upp til sínar skyldur er seinasti spurningurin frá Javna. Nei, tað haldi eg ikki at vit hava. Vit hava sæð eina støðuga niðurlaging á almannaøkinum seinasta árið. Smáar upphæddir á fíggjarlógini eru spardar, men tær hava havt ovurhonds stóra ávirkan á gerandisdagin hjá teimum, sum eru rakt. Tað løgna er, at spariuppskotini vit enn hava sæð, hava verið einamest á almannaøkinum. Vit síggja lítið til at samgongan berjist fyri at bøta um støðuna. Fyrsta dagin skulu vit viðgera eina eykajáttan, sum er ovurhonds stór. Veit tó einki um, at tað eru børn og ung við serligum tørvi, ella pensjonistar sum fáa gagn av henni.

Samstundis fáa vit eitt hall sum er fleiri 100 talsmilliónir í ár – hví hava vit tá bara sæð spariuppskot sum raka tey, sum eru so meint rakt longu sum er?

Óli Wolles segði tað so rámandi í tíðindunum. "Vit fáa dagliga fráboðanir frá fólki um, hvussu verður klípt og skorið burtur. Familjurnar siga seg ikki merkja nakað til kreppuna á øllum øðrum økjum, uttan í mun til eina barnið...nevniliga tað sum ber brek. Hjá øllum hinum gongur sum tað plagar." Haldi, hetta er júst kjarnin – hví skal kreppan raka tey sum bera brek harðast... umframt pensjónistarnar, havi eg hug at skoyta uppí. Vit áttu væl at lyft í felag – men breiðastu herðarnar mest.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.